Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin)
(Ferðaútreiðslur sum standast av samveru í sambandi við uppihald á stovni uttanlands)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 166 frá 12. desember 2020 verður § 22, stk. 8 orðað soleiðis:

"*Stk. 8*. Barnaverndartænastan ber, eftir umbøn, ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru innanlands. Landið ber ferðaútreiðslurnar sum standast av samveru í sambandi við uppihald á stovni uttanlands."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 14. desember 2020.

Samtykt á Løgtingi hin 25. mars 2021 við 31-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 25. mars 2021

stjóri

lm. nr. 89/2020